## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind ella skrið av landsynningi og regn. Um kvøldið minkar hann vindin av suðri og okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi ella av ymsum ættum og regn av og á. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri, týsdagin hækkar hann upp í landnyrðing. Ælingur, sum frálíður kavi og hitin mánadagin niður móti frostmarkinum, týsdagin frost.

# 23 ansingarpláss hjá Føroya Tele

**Dagstovnurin hjá Føroya Tele hevur móttøku fyrrapartin í dag í sambandi við, at byrjað veðrur í næstu viku. Í fyrsta umfarið verða 23 børn á dagstovninum, og tá er talan bert um børn hjá starvsfólkum hjá Føroya Tele**

DAGSTOVNUR
*Ingrid Bjarnastein*

– Longu nú áðrenn dagstovnurin letur upp í næstu viku, hava vit upplivað nógv positivt hesum viðvíkjandi, sigur Andras Róin, stjóri á Føroya Tele.

– Dagstovnurin hevur verið til hjálp hjá felagnum at fáa starvsfólk niðri frá, tí trupulleikin fyrr hevur verið, at fólk hava verið eitt sindur trek at koma til Føroya at arbeiða vegna bústaðartrupulleikar og vantandi ansingarpláss. Hetta hevur verið ógvuliga avgerandi, at Føroya Tele hevur nakrar aktivitetir í gongd, og fleiri fólk eru komin at arbeiða hjá okkum av tí vit kunnu bjóða børnunum ansingarpláss.

Á stovninum verða umleið fimm pedagogar og tvey hjálparfólk. Stovnurin er jú nýggjur, hann er líðugur innan, men enn manglar ymiskt uttanfyri, og væntandi verður tað líðugt til várs.

– Í fyrsta umfari verða 23 børn á stovninum, men stovnurin er annars normeraður til 34 børn. Stórt grundstykki er rundan um, og ætlanin er at plássið uttanfyri skal verða nýtt til fulnar. Hesin dagstovnurin skal ikki standa aftanfyri aðrar dagstovnar, kanska heldur tvørturímóti.

Dagstovnurin er annars ein kommunalur dagstovnur. Føroya Tele hevur skipað fyri íløgum til húsini.

Móttøka verður í nýggja dagstovninum í dag, og verður tá navnið eisini navnið avdúkað.



*Nýggi dagstovnurin hjá Føroya Tele kemur í fyrsta umfari at hýsa 23 børnum. Stovnurin er annars normeraður til 34 børn*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷10 |
| Nuuk | ÷7 |
| Qaqortoq | ÷3 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | ÷1 |
| Halifax | ÷1 |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 7 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | ÷3 |
| Warzawa | ÷4 |
| Kiev | ÷10 |
| Bukarest | ÷3 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 3 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 10 |
| Malta | 13 |
| Tunis | – |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 15 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 5 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 975 hPa. vestan fyri Ísland grynnist, meðan eitt annað lágtrýst, 979 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer móti Íslandi.




Eitt lágtrýst í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og hevur nógvan vind og avfall við sær. Seinni dregur sama lágtrýst kaldari luft av norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/01 kl. 06⁰⁰– 17/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,8°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 9,0 mm – mált frá 16/01 kl. 06⁰⁰– 17/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 113,1 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

13. jan.: Tendring
18. jan.: Mánin longst frá jørðini
21. jan.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. jan | 10.14 | 22.33 | 09.14 | 21.33 | 09.29 | 21.48 | — | 12.14 | 00.55 | 13.14 | 08.29 | 20.48 | 07.29 | 19.48 | 10.29 | 22.48 | 11.29 | 23.48 | 09.59 | 22.18 | 11.14 | 23.33 |
| 19. jan | 10.50 | 23.08 | 09.50 | 22.08 | 10.05 | 22.23 | 00.33 | 12.50 | 01.33 | 13.50 | 09.05 | 21.23 | 08.05 | 20.23 | 11.05 | 23.23 | — | 12.05 | 10.35 | | 22.53 | 11.50 |
| 20. jan | 11.25 | 23.42 | 10.25 | 22.42 | 10.40 | 22.57 | 01.08 | 13.25 | 02.08 | 14.25 | 09.40 | 21.57 | 08.40 | 20.57 | 11.40 | 23.57 | 00.23 | 12.40 | 11.10 | 23.27 | 00.08 | 12.25 |
| 21. jan | — | 12.14 | 11.14 | 23.46 | 11.29 | — | 01.42 | 14.14 | 02.42 | 15.14 | 10.29 | 23.01 | 09.29 | 22.01 | — | 12.29 | 00.57 | 13.29 | 11.59 | — | 00.42 | 13.14 |

Spf.
...hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

5 707265 100050 >